# Oceanic Days



*Tónaskaldið og dirigenturin. Sunleif Rasmussen og Bernharður Wilkinson fingu blómur handaðar eftir konsertina*



*Ummæli*



BJARNI BERG
*MYNDIR: JENS K. VANG*

*Konsert í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 31. mars 2000, við Sinfóníuhljómsveit Íslands. Dirigentur: Bernharður Wilkinson, solistur Anna Elisabeth Klett. Skrá: Galdra Loftur eftir Jón Leifs, klarinett konsert í A-dur K. 622 eftir W.A. Mozart og Oceanic Days, Symfoni nr. 1 eftir Sunleif Rasmussen.*

Fyri meg var hetta vikuskiftið serliga hendingaríkt. Frammanfyri stóð vitjanin av íslendska symfoniorkestrinum, bara tað er í sær sjálvum er eitt stórt og serstakt upplivilsi fyri meg. Forvæntningarnir til konsertina fyri meg og fleiri við mær gingu mest út uppá okkara nýggju og einastu symfoni, sum nú í trý ár hevði ligið tigandi í skuffuni hjá Sunleifi í Taastrup. Restin av skránni varð ikki kunngjørd fyrr enn seinni. Tó hevði eg latið mær fortalt fyri umleið tveimum mánaðum síðani at Anna Klett skuldi vera solistur, og tað gleddi eg meg eisini almikið til.

Tó tær størstu forvæntningarnar hjá mær vóru symfoni nr. 1 hjá Sunleif ella symfoni nr.1 hjá føroysku tjóðini.

Hetta bar nakað óbeskriviliga undarligt við sær, at okkum skuldi ognast eina symfoni, sum annars bert tær stóru tjóðirnar úti í verðini megna - eins og ein fremmandur fuglur, sum boðar frá nøkrum nýggjum, men sum eisini kann geva okkum eina kenslu av ótryggleika.

Men hví ikki ?? Vit hava fyrr brotið upp úr nýggjum. Einaferð var Makedonarin nakað heilt nýtt og áður óroynt, var ikki eisini Sjeyk tað og Atlantic Airways ??!! Jú vit kunna eisini. Vit hava fólk til tað, bara tey fáa møguleikan. Kanska verður fullveldi tað næsta.

Tað var fleiri ferðir boða frá, at symfoniin skuldi framførast í 1998, í 1999 og so endiliga var veruleikin frumframførsla í 2000.

**Symfoniin fyrst**

Eg sat sum á nálum og royndi at súgva til mín hvønn tóna, hvørt ljóð, hvørja rørslu og hvørja solo, har var so nógv at lurta eftir, at ógjørligt var at taka alt til sín eftir eina framførslu. Eg hoyrdi eitt stórt orkesturverk á altjóða støðið, við einum modernistiskum dámi, sum kann framførast alla staðni í verðini.

Oceanic Days? Jú, tað passaði. Eg kendi ein dám av at vera á sjónum við at uppliva tær margbroyttu klangfasadurnar ígjøgnum orkestrið, væl kryddað við percussion, synthesizarum, off stage tónleikarnum og surroundeffektum.

Eitt sera úttrykksfult verk, ella sum onkur nevndi tað, neoimpressionistiskt.

Ein nútíðar symfoni hevur ikki tað sama innihald, tematiskt ella melodiskt, sum vit kenna tað frá klassisku ella romantisku tíðini.

Hvørji symfonisk eyðkenni eru so hjá Sunnleifi? Í hvussu so er eitt stórt symfoniorkestur, tríggjir satsir, gjøgnumført tematikst arbeiði, ein seintgangandi annar satsur og ein dámur av eini finalu ímóti endanum, fyri at nevna nøkur dømi.

Strukturin í verkinum var fjøltáttaður, stundum einkul homofoniskur, aðrar tíðir polyfoniskur og stundum merktur av surialismu. Stílurin er seinmodernistiskur í tónamálinum, har t.d. dur og moll akkordir gjarna mugu fyrikoma, meðan t.d. tær flestu klangeffektirnar eru vanligar fyri 20-aldar tónleik.

Tað sum var serstakt og serliga effektfult og væleydnað hesum viðvíkjandi, var surrround effektin, hetta, at ljóðið ferðaðist runt í rúminum. Eisini góvu synthesizaraljóðini tí symfoniska klanginum eina heilt nýggja og effektfulla dimension, umframt lítli smakkurin í triðja satsi av sangi, meðan strúkararnir spældu, var yndisligt og effektfult.

Modernistiskur tónleikur kann vera ringur at fylgja og skilja, tí vit sum áhoyrarar mangla nøkur elementir í okkara máta at lurta uppá. Eitt tema t.d., helst sangbart, sum vit kunnu fylgja ígjøgnum verkið og sum fyri áhoyrarar ger, at verkið upplivist sum ein heild.

Symfoniin hjá Sunleif var einki undantak í so máta. Tema, soloir, klangir, effektir so fragmenterað, at ringt er at finna tað, sum bindur verkið saman, ger tað til eina heild. T.d. staðið, har strúkararnir sungu. Tú reageraði bara - meir syngið meir. Nei, bert ein lítlan smakk, so víðari til nakað annað. Tað, sum bant verkið, saman var tað stóra og margbroytiliga klangkanvassið, sum ongantíð var í frið og sum ongantíð gav tær frið..... »fyrr enn tú líst við kai....« endiliga friður.

Upplýsingar Sunleifs um nýtslu av føroyskum kvæða og sálmaskatti kann tykjast villleiðandi fyri áhoyrararan, sjálvt um hann týðuliga undirstrikar, at føroyska tilfarið ikki beinleiðis kann hoyrast.

Við hesum upplýsingum í bakhøvdinum, vil áhoyrarin ótilvitað tvinga seg at royna at hoyra kvæði ella sálmasang.

Fyri meg er verkið avgjørt í altjóða stíli heldur enn føroyskum. Tað ber brá av tí tivandi, óróliga, urbana lívinum. Eins og í verkum eftir italiumannin Bruno Maderna, har spælt verður upp á allar streingir í orkestrinum í víðastu merking, sum Sunleif eisini ger.

Hetta er okkar fyrsta symfoni. Hjartaliga tillukku við tí Sunleif Rasmussen. Tú hevur við hesum verkið sett ein nýggjan dagsordan fyri føroyskt tónasmíð. Nú er bara ein leið fram eftir fyi teg og verandi og komandi føroysk tónaskald, og tað er at ríka enn meira um føroyska tónalist, har eisini stórverk eru ímillum.

**Upplivilsi**

Á skránni var eisini Galdra-Loftur eftir íslendingin Jón Leifs, sum er sermerkt tónaskald. Hann leitaði eftir einum ramíslendskum tónafalli, sum ikki mátti líkjast nøkrum øðrum í heiminum. Av somu orsøk upplivdi hann fá av sínum verkum framførd í sínum heimalandi. Tey seinnu árini er tó birt nýt lív undir áhugan fyri verkum hansara.



*Pól Jákup Thomsen, Føroya Symfoniorkestur, handaði Sunleifi gávu*

Tað var eit stórt upplivilsi at hoyra íslendska symfoniorkestrið framføra hetta verk. Tú fekk eina kenslu av, at hetta var teirra egna, og fólk yvirhøvur dámdi hetta verkið sera væl.

Tað hevði eg ikki væntað, tí tónlist Jón Leifs er so serstak og púra ókend fyri føroyingum. Kann tað vera, at brøðratjóðirnar hava ein felags grundtóna sum ger, at vit á ein serligarn hátt so væl skilja hvør annan. Liggur tað kanska í kirkjuklokkunum, sálmasanginum, eiðunum, rungan úr grøvunum og toruslátttinum, sum nevnt í skránni?

Síðst, men ikki minst, er tað eins stórur heiður fyri Onnu Elisabeth Klett, at fáa loyvi at spæla eitt av kendastu og fremstu verkum fyri klarinett saman við íslendingunum. Vit eiga at verða stolt av at eiga fólk, sum kann bjóða seg fram til eina slíka uppgávu.

Anna spældi klarinettkonsertina við ósvikaligum tekniskum tryggleika, klangligum og musikalskum varierandi spæli. Anna hevur ein serligan vakran, mjúkan klang og ein serligan varierandi dynamikk, har hon stundum fer heilt niður í tað næstan óhoyriliga. Innímillum vantar tó rætningur í veiku setningunum og Anna gloymir at imponera áhoyraran tá høvi býðst. Men tað ger hon hinvegi við sínum sjarmerandi rørslum.

Anna Klett er eftir mínum tykki ein av okkara bestu solistum, sum hevur eitt umfatandi tónleikavirksemi í Danmark. Nýliga var hon solistur onkrastaðni í Russlandi, har hon framførdi eina klarinett konsert.

Tað er uppgáva tykkara, kæru fjølmiðlar, at fylgja við slíkum fólki til gleði fyri okkum lesarar/lurtarar/hyggjarar. Gloymið ikki, at hetta eisini er søguligt tilfar til komandi ættarlið.

Tað er stórt upplivilsi fyri meg hvørja ferð, ið íslendingar koma higar at spæla. Tit sum stíla fyri, gerið hetta til ein fastan tátt í einum mentanarligum samstarvi við brøðratjóð okkara.

Takk til íslendska symfoniorkestrið og takk, Bernharður Wilkinson, fyri fantastiska leiðslu.



# Fyrsta føroyska symfoniin framførd

*Fríggjakvøldið fór søgulig hending fram í Norðurlandahúsinum. Íslendska Symfoniorkestrið leikti Symfoni nr. 1 eftir Sunleif Rasmussen fyri fullsettum sali*

DAGFINN OLSEN

Sunleif Rasmussen hevur skrivað sína fyrstu symfoni. Hon er samstundis tann fyrsta í føroysku tónleikasøguni.

Fríggjakvøldið leikti Íslendska Symfoniorkestrið symfoniina, ið hevur fingið heitið Oceanic Days. Íblásturin til heitið er frá William Heinesen, ið nevnir, at „det er igen en af disse oceaniske dage“

Norðurlandahúsið hevði latið upp millum salin og Klingruna. Áhugin var stórur fyri søguligu konsertini og útselt var til konsertina fríggjakvøldið og tískil var eykakonsert leygardagin.

Sunleif hevur í verkinum roynt at lýsa havið, sum ein upplivir tað í Føroyum. Sermerkt var, at áhoyrararnir í salinum vóru sum smáar oyggjar. Tónleikur, ella hav, í allar ættir. Umframt orkestrið fremst í salinum, stóðu nevniliga eisini tveir tónleikarar, ið leiktu slagverk, aftast í salinum.

**Dirigentur úr Sumba**

Symfoniin var føroysk. Orkestrið íslendskt. Dirigenturin var hálvur føroyingur.

Bernharður Wilkinson byrjaði sum kórdrongur í London. Í 1969 fór hann undir tvørfloytustudium. Hann leikar við Blásarakvintett Reykjavíkar. Í 1975 fekk hann starv í Íslendska Symfoniorkestrinum.

Hann hevur fleiri ferðir stjórnað orkestrinum. Hann hevur eisini fleiri ferðir vitjað í Føroyum og hevur luttikið á Summartónum.

Bernharður Wilkinson er hálvur føroyingur. Mamman, Anna Dam, er úr Sumba.

Eftir frumframførsluna fríggjakvøldið fingu Berharður Wilkinson og Sunleif Rasmussen blómur handaðar. Síðani vóru røðarar á skránni. Fyrst var Helga Hjörvar, stjóri í Norðurlandahúsinum. Síðani Høgni Hoydal, landsstýrismaður, Helgi Hjörvar, Reykjavíkar Býráð, Pól Jákup Thomsen, Føroya Symfoniorkestur og Þröstur Ólafsson, dagligur leiðari í Sinfóníuhljómsveit Íslands.



*Fríggjakvøldið fór søgulig hending fram í Norðurlandahúsinum. Íslendska Symfoniorkestrið leikti Symfoni nr. 1 eftir Sunleif Rasmussen fyri fullsettum sali*

**Lesið í morgin: Frits Johannesen umrøður Oceanic Days**




## GSM frá Telebúðunum

**...so ert tú altíð har, tú skalt vera!**



**Ericsson T10s**
PRÍSUR VIÐ MVG **1990,-**
Fartelefonin til tín, sum fegin vil hava ta nýggjastu tøknina, men sum eisini fegin vil hava eina snøgga bíliga telefon, mann leggur merki til.



**Ericsson T28s**
PRÍSUR VIÐ MVG **5295,-**
Er ikki bert minsta fartelefonin, ið Ericsson hevur á marknaðinum. Hon er eisini nýskapandi við hópin av hentleikum m.a. vibrator, raddarstýring og profil-funktiónir.



**Nokia 3210**
PRÍSUR VIÐ MVG **2095,-**
Hóast telefonin er lítil og snøgg, hevur hon ein stóran skíggja við stórari upploysn, sum gevur góðan mótlit og týðiligar bókstavar, ið eru lættir at lesa.



**Nokia 8210**
PRÍSUR VIÐ MVG **5390,-**
Fartelefonin sum lurtar, tá tú tosar. Tú kanst goyma upp til 8 nøvn, sum tú kanst ringja til og sum verða styrd av røddini hjá tær. Er ein av lættastu telefonunum hjá Nokia.



**Nokia 8850**
PRÍSUR VIÐ MVG **6795,-**
Uppkøllini kunnu stýrast av røddini hjá tær. Eisini er telefonin skjót at nýta, tá tú skalt skriva tekstboð, tí telefonin minnist, hvørji orð tú fyrr hevur skrivað. Hevur innbygda antennu og góða ljóðgóðsku.



**Siemens C25**
PRÍSUR VIÐ MVG **1695,-**
Sera lítil, snøgg og bílig telefon, sum bert vigar 135 g. Er tilbúgvin í upp til 100 tímar og hevur upp til 5 tíma talutíð.



**Siemens S25**
PRÍSUR VIÐ MVG **2895,-**
Hóast telefonin er lítil, hevur hon hópin av eyka hentleikum. Tær tørvar ikki eyka kaðal ella aðrar tvørligar innleggingar – við S25 kanst tú senda og fáa teldupost o.a. við einum infrareyðum interface.



**Motorola V3688**
PRÍSUR VIÐ MVG **5895,-**
Telefonin hevur hópin av hentleikum, m.a. vibrator, sum ger, at tað ikki er neyðugt at órógva onnur, tá telefonin ringir.

petur & petur • 320870

*Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og útseldum vørum.*

TELEBÚÐIN

Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00